HB-GÍ:

# HB vil halda kósini

**Hvørki stórskjúttin hjá HB ella verjuálitið hjá GÍ vera við, tá HB sunnudagin fer at dyrgja eftir fjórða sigrinum á rað**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað var júst í heimadystinum móti GÍ, at skrædlið hjá HB byrjaði í fjør. Fram til tá hevði liðið spælt nakað, sum líktist meistaraspælið, teir høvdu seks stig fyri tveir dystir og alt tóktist ganga sum eftir ánni.

Ta ferðina vann GÍ tó dystin, og meðan gøtumenn síðani hildu áfram at vinna næstu sjey dystirnar á rað, steðgaði alt fullkomuliga upp hjá HB.

### Tveir á toppinum

Tað tykist tó ikki, sum um tey í HB óttast eina endurtøku, hóast minnini frá í fjør sjálvandi enn eru hampuliga fesk.

- Tað er ikki heilt frítt, at vit hava ring minni frá júst tí dystinum, men tað er kortini ikki nakað, sum vit hugsa stórvegis um, sigur Rúni Nolsøe, sum aftur í ár er liðskipari hjá HB.

- Móti GÍ vita vit tó altið, at talan er um truplan dyst. Teir geva seg altíð fult út, so hóast vit ikki óttast teir, so hava vit sjálvandi virðing fyri mótstøðuni, men vónirnar hjá okkum til dystin verða ikki minni av teirri orsøk. Skalt tú vera í oddinum, so skulu heimadystirnir kasta trý stig av sær, og so er tað líka mikið, hvør mótstøðan er. So einfalt er tað, heldur liðskiparin.

Annars sigur Rúni, at tað enn ikki er heilt vist, hvørjir leikarar verða tøkir til dystin sunnudagin. Uni Arge hevur framvegis nakað av pínu í rygginum, og hann hevur ikki vant hesa vikuna, so tað líkist aftur hesa ferð einum tveymanna álopi, sum tó framvegis er eitt hitt vandamesta í landinum.

Eisini Hans á Lað, sum í ár hevur spælt vinstri bakkur, tykist ivasamur. Hann fekk onkran snudd undir venjingini týsdagin og hevur ikki vant síðani. Ein upplagdur avloysari kundi verið Janus M. Joensen, sum hevur verið skaddur í fyrireikingunum til árið, men sum nú er um at koma fyri seg aftur.

### Bert Bartal restar

Einasta fráveran, sum tykist raka GÍ sunnudagin, er Bartal Eliasen, sum fekk triðja gula kortið í eins nógvum dystum seinast. Í hansara stað verður eftir øllum at døma Pól Ennigarð, sum júst er komin aftur úr Danmark. Hann sat á beinkinum allar 90 minuttirnar seinast, men fær nú væntandi kjansin saman við Leivi Hansen í miðverjuni.

Annars tykist tað, sum um allir spælarar eru tøkir. Onkrir teirra hava drigist við skaðar, men liðskiparin, Magni Jarnskor, heldur tó, at tað nú gongur rætta vegin.

- Tað gongur í øllum førum tann vegin, at allir eru um at koma heilt fyri seg. Eisini Súni Olsen, sum noyddist út við skaða móti Skála. Talan var helst bara um eitt trælær, og hann hevur so verið og runnið, so vit rokna við, at allir eru klárir at tørna út.

Og tá tosið fellur inn á vónirnar til dystin, letur Magni sum vant væl at.

- Vit fara so altíð eftir sigrinum. Higartil hevur tað tó koyrt sera væl hjá HB, samstundis sum vit hava verið heldur tungir. Men vit mugu so onkursvegna royna at steðga teimum. Størsti trupulleikin hjá okkum hevur kanska verið, at vit koma ov seint í gongd, tá dysturin byrjar, og tað er so nakað, sum vit ikki hava ráð til í longdini, so tað skal helst broytast hesaferð, sigur Magni Jarnskor at enda.



*Súni Olsen noyddist skaddur av vøllinum, tá GÍ spældi móti Skála, men tað verður roknað fyri víst, at hann verður við aftur, tá GÍ sunnudagin vitjar hjá HB*

*Mynd: Jonhard Hammer*

TB-B36:

# Tíð at ressast

**Bæði TB og B36 hava tørv á stigum og - ikki minni – á uppreisn, tá tey sunnudagin tørna saman á Sevmýru**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað var vorið sum smeitur, sum tvøramenn fingu, tá teir seinasta mánadag vóru í Klaksvík. Eitt stórtap upp á 7-0 varð úrslitið ta ferðina, og hóast tað altíð er trupult at spæla ímóti mest vinnandi liðnum í bestu fótbóltsdeildini, so høvdu uppflytararnir helst vónir um eitt betri úrslit enn hetta á teirri ferðini.

### Skulu reisast

Tað eru tó ikki stundir at dvølja við slíkar hendingar, um tú skalt gera teg galdandi í bestu deildini. Nýggj og stór avbjóðing stendur longu nú fyri framman, tá B36 kemur á vitjan, og helst er farna vikan einamest nýtt til at fáa dystin í Klaksvík úr høvdunum á leikarunum, soleiðis at øll orka kann leggjast í hesaferð.

Og vónirnar um eitt hampuligt úrslit munnu heldur ikki vera heilt ongar á Tvøroyri.

Undir øllum umstøðum hevur tað aloftast verið so, at TB er munandi treiskari heima á Sevmýru, har teir í trúføstu áskðarafjøldini hava ein heimastuðul, sum fáum er unt.

Sum skilst er heldur ikki talan um fráveru av nøkrum slag undan dystinum. Tá vit fregnaðust hóskvøldið vóru allir mans tøkir, og so er tað upp til Zoran Mancic at gera av, hvørt kortini skulu blandast øðrvísi hesaferð, ella um teir somu ellivu sum seinast nú skulu hava møguleikan at reisa seg.



*Í B36 hava teir fleiri skaðar at dragast við, men liðskiparin uggar seg við, at støðan um sama mundi í fjør var júst hin sama*

### Fleiri skaðar

Í B36 var lagið ringt, sum vera man, eftir at teir vóru við undirlutan í grannauppgerðini móti HB. Hetta ger sjálvandi, at tørvurin á stigum hesa ferð er enn størri, og teir ætla sær undir ongum umstøðum at missa fleiri stig móti uppflytarunum, eftir at teir í øðrum umfarinum spældu javnt á Skála.

Tað hevur tó verið stórt mannfall í árstalsfelagnum seinastu tíðina, og við evstamark okkara var framvegis ivasamt, hvørjar leikarar Piotr Krakowski kundi hava við sær til Suðuroyar.

Fótskaðin hjá Klæminti Matras versnaði, tá hann treiskaðist og kortini spældi við móti HB. Í tí dystinum noyddist Niels Joensen eisini av vøllinum við skaða, umframt at rumenski Din Sandu enn ikki til reiðar at spæla, eftir at hann í longri tíð hevur drigist við vøddaskaða.

Hóast teir soleiðis eru nakað skerdir, so ugga teir í B36 seg við, at um sama mundi í fjør var støðan á leið hin sama.

- Eftir trý umfør høvdu vit fýra stig, meðan oddaliðið hevði fult stigatal, so støðan er júst hin sama, sum hon var í fjør, sigur liðskiparin á liðnum, John Petersen.

- Tað er tó ikki so, at vit longu nú hugsa um nakað FM-heiti, men tað kunnu vit so í øllum førum nýta, til at siga okkum sjálvum, at enn er nógv eftir at spæla um, og vit fara so í øllum førum eftir stigunum, sigur hann at enda.

## Komandi dystir

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 25.05 | Skála-VB | Oddmar Andreasen |
| 26.05 | EB/S-NSÍ | Jens Petur Brattalíð |
| 26.05 | TB-B36 | Páll Augustinussen |
| 26.05 | B68-KÍ | Niklas á Líðarenda |
| 26.05 | HB-GÍ | Birgir Sondum |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 25.05 | B71-FSV | Tummas Pauli Olsen |
| 25.05 | B36-KÍ | Jonhard Hansen |
| 25.05 | Sumba-ÍF | Eiler Rasmussen |
| 25.05 | LÍF-VB | Rúni Gaardbo |
| 25.05 | NSÍ-HB | Jón Kári Frederiksen |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 26.05 | AB-FSV | Ransin N. Djurhuus |
| 26.05 | YB-B36 | Eyðun Kjærbo |
| 26.05 | B68-B71 | Edvard Højgaard |
| 26.05 | HB-GÍ | Jóhann Krogh |
| 26.05 | Royn-ÍF | Poul Erik Jacobsen |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 26.05 | KÍ-B36 | Jógvan A. Jacobsen |
| 26.05 | HB-B68 | Georg Rasmussen |



B68-KÍ:

# KÍ aftur til próvtøku

**Klaksvíkingar vilja fegnir vinna, men teir ásanna, at tað verður torført á Toftum, tí B68 hevur havt stóra úrtøku, sjálvt um avrikini ikki enn hava verið sannførandi**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Síðsta sunnudag glapp tað hjá KÍ. Í morgin verður tað greiðari, um stórsigurin ímóti tvøramonnum fyrst og fremst komst av, at TB ikki er serliga væl fyri, ella um tað var KÍ, sum er komið fyri seg, eftir at tvey tey fyrstu umførini hjá teimum vóru sera trilvandi.

Í Klaksvík halda tey, at um KÍ einki fær burturúr á Svangaskarði, so eru teir ikki komnir so nógv longri, enn teir vóru undan sigrinum á TB. So verður tað framvegis tøving í botninum heldur enn, at kósin verður sett ímóti plássunum, sum tað er hugaligt at stríðast um.

Hjá KÍ er tað betri statt manningarliga, enn tað hevur verið higartil í ár. Allir spælararnir hava vant í hesi vikuni. Tað verður roknað við, at Jan Andreasen og Ove Nysted, sum hava verið skaddir, vera í hópinum. Allan Joensen hevur vant í vikuni, men tað hevur bara verið við hálvari ferð. Hann er framvegis plágaður av vøddaskaðanum, sum hevði við sær, at hann noyddist at fara út ímóti TB. Og so er tað komið afturat, at hann hevur brotið ein fingur, so armurin er lagdur í gips. Tí er hann ivasamur í morgin.

B68 hevur framvegis ikki tapt í landskappingini. Tað fegnast teir um á Toftum, men teir ásanna samstundis, at burtursæð frá á Sevmýri, har teir vunnu 4–1, hevur spælið higartil ikki verið, sum tað kann roknast við av einum toppliði. Fróði Benjaminsen er tøkur aftur, eftir at hann var leikbannaður seinast. Spurningurin er, um Fríðin Ziskason verður við frá fyrsta bríksli ímóti gomlu liðfeløgunum. Eftir dystin ímóti EB/Streymi eigur tað ikki at vera óhugsandi, at Fróði Benjaminsen og Fríðin Ziskason fara at spæla á sentrala miðvøllinum.



*Í steypakappingini vunnu toftamenn og klaksvíkingar eina ferð í part á hvørjum øðrum, so tað er torført at gera nakað av liðunum til favoritt sunnudagin*

### KÍ er framvegis omaná

B68 og KÍ hava dystast í 1. deild á hvørjum ári síðani 1981. Av teimum 42 landskappingardystunum hevur KÍ vunnið seytjan, B68 hevur vunnið tíggju, og fimtan ferðir hevur tað verið javnleikur. Málmunurin er 76–60 til fyrimunar fyri klaksvíkingar.

Á Toftum hevur B68 vunnið átta ferðir, KÍ hevur vunnið sjey ferðir, og seks ferðir hevur tað verið javnt. Har er málmunurin 32–30 B68 til fyrimunar. Í fjør vann B68 4–0 á heimavølli ímóti KÍ, og í fyrraárið vunnu teir 6–1. Tað var størsti sigurin nakrantíð hjá B68 ímóti KÍ. Størsti sigurin hjá klaksvíkingum ímóti B68 á Svangaskarði var í 1998, tá teir vunnu 5–1 Størsti sigurin yvirhøvur hjá KÍ ímóti B68 var í Klaksvík í 1999. Tað árið vann KÍ FM, m. a. tí teir vunnu 5–0 á heimavølli ímóti B68. KÍ og B68 vóru í bólki saman í steypakappingini. KÍ vann 4–1 í Klaksvík, og B68 vann 4–1 á Toftum.

EB/Streymur-NSÍ:

# Trygvi ímóti sínum egnu

**Fyrrverandi NSÍ venjarin heldur seg hava uppskriftina uppá, hvussu hansara lið kann vinna. Christian Høgni Jacobsen er tøkur hjá NSÍ, men teir kvíga fyri, at onkrir aðrir lyklaspælarar ikki vera við**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

yri fyrstu ferð í týdningarmiklum dysti skal Trygvi Mortensen stríðast fyri at fella NSÍ. Trygvi spældi øll síni fótbóltsár í barndómsfelagnum, og hann hevur í tveimum umførum havt venjaraábyrgdina av NSÍ.

Nú er hann oddamaður hjá EB/Streymi, sum í morgin á Mølini skal stríðast fyri at fáa stig og helst at vinna ímóti NSÍ. EB/Streymur vann fimm dystir í fjør. Ein av teimum var ímóti NSÍ við Trygva Mortensen við róðrið. Úrslitið var 1–0.

– Vit halda okkum hava eina spæliætlan, sum er góð ímóti júst NSÍ. Tú fært meg ikki til at siga, hvat vit hugsa um, men sjálvandi fara vit eftir øllum stigunum, sigur EB/Streyma venjarin, sum ikki heldur seg kenna nakrar serligar kenslur, nú hann skal spæla ímóti sínum felag.

– Soleiðis er tað ikki í fótbólti. Eg hugsi um liðið, sum eg havi ábyrgdina av og ikki annað enn tað.

Í EB/Streymi eru allir teir somu spælararnir tøkir, sum taptu 2–1 á Toftum. Tá hevði EB/Streymur ikki so lítið spæl.

– Trupulleikin hjá okkum hevur í ár verið, og hann var eisini ímóti B68, at vit spæla okkum til ov fáar upplagdar møguleikar. Tí er tað sera týdningarmikið, at vit fáa nyttu burturúr møguleikunum. Sorin Anghel fekk ein fínan møguleika beinanvegin á Toftum, men hann misnýtti. Um hann hevði fingið mál, høvdu fyritreytirnar verið heilt øðrvísi enn tær nú vóru, heldur Trygvi Mortensen.



*Sjúrður Jacobsen hevur ikki vant í vikuni, og tað verður mett at vera ivasamt, tá runavíkingar sunnudagin skulu dystast móti fyrrverandi venjaranum*

### Christian Høgni verður við

Christian Høgni Jacobsen var ikki við, tá NSÍ var í Vági. Tað komst av, at tey á skrivstovuni hjá DBU ikki vildu avgreiða spæliloyvið fríggjadagin. Tey ganga høgt uppí, at spæliloyvið skal vera eina nátt á skrivstovuni. Esbjerg sendi ikki leysgevingina til DBU fyrrenn fríggjamorgunin, og so var einki at gera við tað. Fyrrapartin týsdagin vóru viðurskiftini komin í rættlag, og Christian Høgni verður við á Mølini.

Hjá NSÍ er Pól Thorsteinsson tøkur aftur. Hann var leikbannaður, tá NSÍ 2. hvítusunnudag var í Vági. Ta ferðina noyddist Helgi L. Petersen at taka seg av vøllinum, tá bara eitt stórt korter var farið. Hann hevði fingið eitt hald í ryggin. Helgi hevur ikki vant í vikuni, og hann verður neyvan við í morgin. Sjúrður Jacobsen hevur heldur ikki vant. Hann hevur verið plágaður av skaða í lærkrikanum.

## Soleiðis hevur gingist

*Talvan niðanfyri sýnir, hvussu mótstøðuliðini um vikuskiftið hava staðið seg, tá tey áður hava hitst í bestu mansdeildini*

| | '01 | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| EB/S-NSÍ | 1-0 | - | - | - | - | - | - | 2-1 | - | - | 2-0-0 | 3-1 |
| TB-B36 | - | - | - | 1-1 | - | 0-3 | 3-2 | 0-2 | 0-2 | 5-1 | 2-1-3 | 9-11 |
| B68-KÍ | 4-0 | 6-1 | 2-3 | 1-5 | 1-2 | 0-4 | 2-1 | 3-0 | 0-3 | 0-0 | 4-1-5 | 19-19 |
| HB-GÍ | 2-3 | 5-0 | 2-0 | 3-0 | 2-0 | 3-2 | 0-0 | 1-0 | 1-1 | 1-1 | 6-3-1 | 20-7 |
| Skála-VB | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |